**Spælireglur:**

Spælið er ætlað børnum frá 4 ár og uppeftir, tó mugu yngstu spælar-arnir hava hjálp.

Hvør spælari velur sær ein IRF-bil. Byrjað verður niðast í vinstra horni. Ringlað verður um, hvør skal byrja spælið. Spælarin ringlar og flytir sín IRF-bil fram eins nógv fet, sum terningurin vísir. Tá ið spælarin endar á einum myndatekni ella einum felti við IRF-bili á, fær hann at vita, hvat hann skal gera, fyri at koma víðari í spælinum. Tá ið spælarin kemur á eitt spurnartekin, tekur hann eitt kort upp, sum sigur, hvat hann skal gera. Á kortinum hevur rætta svarið striku undir.

Tann spælarin, ið kemur fyrst á mál, hevur vunnið spælið. Neyðugt er at raka beint á málið í seinasta ringlinum. Um spælarin ikki rakar á málið í seinasta ringlinum, stendur hann í stað og bíðar til næsta umfar. Spælarin ringlar eftir túri, inntil hann fær eins nógv eygu, sum mangla í, fyri at koma á mál.

